DAGSINS MEINING

Einki ljós?

Ein góður fíggjarmálaráðharri ger fíggjarlógir, sum halda. Ein góður fíggjarmálaráðharri hvørki yvirbudgetterar ella undirbudgetterar. Vit hava nú í fimm ár verið vitni til markanta undirbudgettering í Fíggjarmálastýrinum. Onkur hevur fullkomuliga misskilt, hvat eyðkennir ein góðan fíggjarmálaráðharra, og hevur hug at rósa Karsten Hansen, hvørja ferð hann skarvar av einari fíggjarætlan, fyri bert seinni í árinum at verða noyddur til at koma afturumaftur við eykajáttanum. Fíggjarmálaráðharrin eigur ikki ábyrgdina av, at vit hava havt hákonjuktur, síðani hann kom í sessin. Harafturímóti hevur fíggjarmálaráðharrin ábyrgdina av, at so illa hevur verið budgetterað seinastu árini. Fíggjarlógin fyri í ár, ella kladdan, sum onkur hevur nevnt hana, er einki undantak í so máta.

Hevur fíggjarmálaráðharrin dugað væl at gjørt forsøgnir fyri føroyska búskapin? Uppundir seinasta val stóð so væl sum ongantið fyrr í Føroyum, um ein skuldi trúð Tjóðveldisflokkinum. Man kvetti tað, sum svarar til eina millión krónur um dagin av í blokkstuðuli. Nú stendur hinvegin so illa til sambært fíggjarmálaráðharranum, at tað ikki er ráð til lønarhækkanir. Antin hevur fíggjarmálaráðharrin reypað ov nógv áðrenn valið, ella ger hann ov nógv av nú. Tíverri fyri Føroya land er tað helst tað fyrra,ið er sannleikin.

Hvørjar aðrar dygdir eigur ein fíggjarmálaráðharri at hava? Alt nýtist ikki at verða tapt, bert tí at ein fíggjarmálaráðharri ikki dugir væl at budgettera ella gera forsøgnir. Samráðingarevni og evnini at loysa trupulleikar mugu standa ovaliga á listanum yvir dygdir hjá einum fíggjarmálaráðharra. Um vit hyggja at almenna arbeiðsmarknaðinum, so hevur ikki sæð pent út seinastu árini. Ongantíð fyrr hava verið so nógv verkføll og klandur á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum undir sitandi samgongu. Tá tað er rættiliga ósannlikt, at alt starvsfólkið hjá tí almenna skal verða blivið ómøguligt eftir einari nátt, so má í hvussu so er partur av trupulleikanum liggja aðrastaðni. Harmiligt at siga so, men tað tykist ikki sum Karsten Hansen hevur skarað fram úr, tá tað kemur til samráðingarevni. Hvussu so við evnunum at loysa trupulleikar? Vit kunnu hyggja at SEV málinum, ið nú hóttir við at leggja landið myrkt.

Leiðslan í SEV kundi ivaleyst havt handlað øðrvísi í málinum um maskinmeistarasáttmálan. Eisini kundi sáttmálin helst sæð øðrvísi út, men nú er tað einaferð so, at Maskinmeistarafelagið hevur ein undirskrivaðan sáttmála í hondini, ið teir eisini hava fingið útgoldið løn eftir tvær ferð. Hetta gevur teimum ógvuliga góð kort á hondina, og vegna egið forsømilisi við undanfarna sáttmála, hevur Karsten Hansen lítið annað í at velja, enn at góðkenna sáttmálan. Sjálvandi eigur hann at taka eina uppgerð við SEV, tí trupulleikin er teirra millum, men eingin orsøk er fyri at landið skal verða giðsil í hesum málinum. Gamani er hækkanin kanska hægri enn búskaparstøðan rættvísger, men sum Karsten Hansen sjálvur hevur sagt, so er eingin grund til, at allir bólkar hvørja ferð skulu fáa sama prosentvísa lønarhækkan. Tað vil altíð vera munur á hvussu eftirspurningurin er fyri ymsar fakbólkar, og hvussu langtíðargongdin hevur verið innan somu bólkar.

Undir øllum umstøðum forsømdi Karsten Hansen at góðkenna seinasta sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið, hóast løn hevur verið útgoldin eftir honum í áravís. Tí hevur fíggarmálaráðharrin als einki at hava núverandi góðkenningarsýtan í, og nú má Løgtingið uppí fyri at forða fyri u-lands tilstandum í Føroyum. Gott klárað?

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Panikkur í Tjóðveldisflokkinum

Lisbeth L. Petersen
Sambandsflokkurin

Møguliga er orsøkin, at tað er fyri at fáa fokus á annað enn politisku trupulleikarnar hjá sitandi landsstýri, at tey nú, kropp av kroppi, loypa upp og skíra undirritaðu fyri ikki at hava sett seg inn í málið, ella fyri at villeiða og siga ósatt um hvat hendi, tá nógv umrøddu hernaðarlógirnar vóru viðgjørdar fyrst á løgtingi og síðan á fólkatingi.

Eg hevði ikki ætlað at farið út í kjak við Høgna Hoydal ella Kristinu Háfoss, tí viðgerðina av málinum á fólkatingi kunnu øll lesa á heimasíðu fólkatingsins, ella fyri at gera tað uppaftur lættari, á heimasíðu Sambandsfloksins. Men tá so formaðurin í uttanlandsnevnd løgtingsins kemur í eini grein við sínum viðmerkingum, so er tað prógvið um, at panikkur er í, tí Hergeir Nielsen blandar alt saman í ein vavgreyt.

Hergeir Nielsen skrivar um uppskotið, ið var viðgjørt á Føroya løgtingi (har undirritaða als ikki luttók undir fyrstu viðgerð, av tí at eg var burturstødd!) og nevnir øll tey málini, meðan hann als ikki hevur uppdagað, at uppskot Torbjørn Jacobsens á fólkatingi var eitt annað, og bert snúði seg um hernaðarlógirnar.

Uppskotið hjá tjóðveldisumboðnum nevndist:
Beslutning nr. B 149 Forslag om folketingsbeslutning
Om at ophæve den danske militære straffelov på Færøerne.
Idet Folketinget anerkender og respekterer, at Færøerne er en selvstændig juridisk enhed, pålægger Folketinget regeringen at tilbagetrække den militære straffelov fra 1973 med senere ændringer, som regeringen uden landsstyrets viden og imod et enigt Lagtings beslutning har bekendtgjort på Færøerne.

Hvørki meira ella minni, og tað er tað málið snýr seg um!

Óneyðugt er at nevna, at Sambandsflokkurin beinanvegin kannaði málið og kundi avdúka, at landsstýrið longu var vitandi um lógirnar.

Til Høgna Hoydal er bert stutt at siga, at heldur hann fram við sínum loysingarpolitikki, við teim fíggjarútlitum sum hansara egni landsstýrismaður við fíggjarmálum tosar so nógv um í hesum døgum, so verður endin, at hann sjálvur leiðir Føroyar aftur í skjútstíðina við teimum ræðumyndum, sum hann málar í síni grein.

Havi eisini hug at nevna tíðina undir seinra heimsbardaga, tá bæði privathús og aðrir bygningar vóru tiknir til hernaðarendamál í Føroyum. Tá var eingin heimastýrislóg, og tað var heldur ikki danskt hernaðarvald, ið hertók ognirnar!

Sjálvandi ynskir ongin okkara at neyðugt verður at brúka hernaðarlógirnar í Føroyum, men at brúka tað, ið hent er, fyri at gera viðurskiftini verri aftur, nú blot annars var komið í fastlæstu og stirvnu viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum, ynskir Sambandsflokkurin ikki. Tí hava vit mótmælt mannagongdini og atkvøtt fyri uppskotunum men samstundis greitt sagt, hvat vit eru ónøgd við og vilja , at tað skal rættast í framtíðini, og tað hava vit eisini fingið lyfti um.

Spurningar bryggjaðir í felagsáhuga

Hjalmar N. Poulsen
álitismaður hjá SEV-meistarunum í Vestmanna

Á skerdum flogi sum snikrunnin, oljudálkaður, lamskotin, setursnáti skrambleaði hann aftur á bøkkin handan heimarókina.

Eg meini, hann er blivin ikki sørt mentaður. Tosar um fín orð sum formalitet, støðutakan til politiska kamelsvølging.

Útkastið til uppritið er enn ikki »formliga« handað ráðharranum, nakað soleiðis vóru orð hansara fríggjadagin hin 13. í hesum. Ikki løgið hetta skuldu blíva hansara óeydnisdagur; hví er hann nú farin at tosa um formalitet í hesum sambandi? Betri seint enn ongantíð!

Spurningurin hjá fleiri við mær verður settur fíggjarmálaráðharranum persónliga: Hví var starvssáttmálin millum SEV og Maskinmeistarafelagið, sum varð praktiseraður áðrenn 28. feb. 2003 ongantíð formliga góðkendur av avvarðandi myndugleikum sambært kommunulógini, stykki 5 í grein 5?

Ein góður spurningur krevur eitt gott svar. Soleiðis er eisini her.

Níggju spurningar til professaran

Jenis av Rana skrivar politiska doktararitgerð í hósdagsdimmu 12. juni, har evnið snýr seg um arrogansu.

Pen mynd er av honum, har hann stendur so skuldarfríur við himmalvendum eygum og helst hugsar um »røddina«. Niðurstøðan av vardu ritgerðini er umtaluð níggju spurningarnir og tilhoyrandi aftursvar frá harranum.

Avtalað spæl fyri gallarínum

Hesir spurningar eru tutan iva bryggjaðir í felagsáhuga yvirav Konditturínum, á trappusteininum á Káta Horni, har útsýnið kann skoðast á rótfastu aldargomlu eikina, sum so støðuføst og stinn stendur sum eitt tekin um fasta grund.

Høvdu hesir spurningar verið settir relevantir og rætt, hevði harrin ikki komið javnfríur ígjøgnum prøvtøkuna, men dumpað. Seinni kemur grundgevingin.

Gud hjálpi okkum, teir gera tað í hvussu so er ikki.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

BROT ÚR BRÆVI (VI)

Heri Mohr

"_.. Nú er frøði úti og inni, drúgva verkfallið, sum gav løgmanni, høgum og lágum hungurs- og hall-hallucinatiónir, er avblást. Tilveran gjørdist beinanvegin lættari og blíðari. Orð Knut Hamsuns runnu mær í hug:
Men blide stunder, det har vi alle.
En Fange sitter paa sin Kjærre
og kjører til Skafottet,
en Spiker gnager ham i Sætet,
han flytter sig og føler det mere behageligt.

Handan aforisman kom úr tí kulturella rangastrúpanum, hoyri eg teg speiskliga siga.

Pápi tín var her í gjár. Hann gjørdi eitt rend á Norðhavið; men veruligur útróður kemur ikki upp á tal, nú verkfallið hevur stongt fiskamarknaðin í 4 vikur. Tað var ein stór teggja, hann gav okkum, og tú ivast sjálvandi ikki í, hvat var í pottinum í dag. Feskt hava vit ikki fingið í næstan tríggjar vikur.

Pápi tín var ikki meira enn farin, so kom Pætur inn á gólvið prátingarsamur og í góðum lag. Seinastu viku var hann inni í Dølum og setti okkum epli niður. Í seinra lagi kanska, men tað man ikki fara at bila, tí, sum hann sigur, opinekran er sera moldgóð. Og hann prátaði væl upplagdur: Tú minnist, at eg í seinastu viku tosaði um okkurt, sum yrkjarin Jóanes Nielsen hevði skrivað í blaðnum Fregnir. Nú hevur hann aftur skrivað, og hesaferð dregur hann sjálvan fanan úr blekkhúsinum. Hann skrivar um Ivan Karamazov og fanan úr skaldsøguni BRØÐURNIR KARAMAZOV eftir Dostojevskij. Ivan, miðlingurin av brøðurnum, er intellektuellur og nógv upptikin av religiøsum og filosofiskum spurningum. Í skaldsøguni lesa vit eisini legendina Stórinkvisitorurin, har Ivan ímyndar sær, at Kristus kemur aftur til jarðar 1500 ár eftir hansara himmalferð. Dramaið fer fram einastaðni í Sevilla í Spania, meðan inkvisitiónin har er í hæddini.

Ivan er ateistur, men í hjartanum goymur hann duldan fagnað fyri Kristus. Ein eginleiki ikki óvanligur hjá Dostojevskij. Eitt kvøldið, táið Ivan kemur til hús, fær hann eina óhugnaliga hallucinatión: Fremmandamaður situr í sofakrókinum, hábærsligur við tjúkkum hári, gránað eitt sindur á vanganum, avstubbað høkuskegg, dámligt anlitsbragd, som tó tykist at kunna broytast allar vegir, lorgnett í silkisnóri um hálsin, breiðan gullring á longutong og myrkabrúnum, mótakendum klædningi. Hesin distingveraði harrin er fanin, sum er komin at vitja, og við einum: orsaka at eg órógvi, byrjar samrøðan millum teir báðar, fanan og Ivan.

Danski háskúlamaðurin Knud Hansen skrivaði í 1973 bók um skaldskapin hjá Dostojevskij, og hana átti tú, Malan, at lisið fyrst, um tú ætlar at gera teg kunnugan við meginskaldið úr Russlandi. Eg veit væl, at Jóanes er bókamaður av teimum frægu, og tú skalt vara teg fyri at koma í hólmgongu við hann. Onkur tók soleiðis til, at tað, sum hann ikki hevur lisið stuttsøguna ET LATTERLIGT MENNESKES DRØM eftir Dostojevskij. Hon handlar um ein ateist, sum við einum dreymi gjørdist eitt annað menniskja. Dreymurin lærdi hann, at tað ónda ikki er menniskjans rættvorðni standur, og at liva eftir boðnum: tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg, orðini, sum eg ikki skilji, tí eingin fær meg at trúgva, at Jóanes hevur fingið BRØÐURNAR KARAMAZOV í tann kulturella rangastrúpan, sum Jógvan plagar at taka til.

Í einum brævi frá tukthúsinum í Sibiria dagfest mars 1854 skrivaði Dostojevskij m.a. soleiðis:
Jeg tror, at der intet skønnere findes, intet dybere, intet så dragende, intet så sandt, så modigt og fuldkomment som Jesus Kristus. Atter og atter fyldes jeg ved tanken om ham af en brændende lidenskab. Jeg siger til mig selv, at hans lige ikke blot ikke findes, men heller ikke kan findes. Jeg siger endnu mere — hvis nogen bragte mig beviset for, at sandheden om vort liv ikke er i Kristus, og hvis det skulle blive slået fast, at sandheden virkelig befinder sig et andet sted end hos ham, så vilde jeg dog vælge Kristus fremfor sandheden.

Óivað hevur Jóanes Nielsen ivi um, at maskinmeistararnir eru í sínum fulla rætti at kenna seg lumpaðar, og eg vóni á ein hátt, at teir fáa viðhald, um ikki annað í rættinum. Eisini haldi eg, at Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, kundi havt gjørt vart við seg á greiðari hátt.

Eftir stendur tó, at leiðsla SEV's má taka fulla ábyrgd av íkomnu støðuni. Stjóri og stórisformaður hava fingið at vita frá Karsteni, at hann góðtók ikki sáttmálan, kortini mæla teir stórinum til at samtykkja sáttmálan. Og ikki nóg mikið við tí, teir undirskriva hann eisini vegna SEV. Ógreitt er tó, um stórið var nóg væl kunnað, áðrenn tað tók avgerð í málinum. Hetta er tó í hesum sambandi meira ella minni líka mikið. Tí var stýrið nóg væl kunnað, so hava allir stýrislimir ábyrgd av avgerðini. Var stórið hinvegin ikki nóg væl kunnað, so hevur tað kortini ábyrgd av, at stjórin og stórisformaðurin ikki eru settir uppá pláss, táið tað seinni fekk sannleikan at vita. Mær vitandi hevur stórið ikki gjørt hetta.

Vit hava tí enn eitt dømi um, at SEV leiðslan handfer eitt mál sera jánkasliga. Um talan er um brot á kommunulógina ella ikki, skal eg ikki gera meg klókan uppá, men haldi eg, at tað sigur eitt sindur um leiðsluevni, táið so lættliga verður farið um í hesum máli, ið hevur havt so stóra ávirkan á alt føroyska samfelagið.

Tað reyða kortið

Umboðsnevnd SEV's nýtist ikki fleiri kanningar av umstøðum o.s.fr. Vit vita væl, hvat ið hendi í málinum viðvíkjandi Vágatunnilinum. Vit vita væl, hvat ið hendi viðvíkjandi sáttmálanum við maskin-meistarunum. Í báðum førum sveik leiðslan okkara álít.

Eg ivist ikki í, at tað eru hampafólk, ið sita í leiðslu SEV's. Hinvegin ber ikki til hjá umboðsnevndini bara at lata standa til. Vit hava eina ábyrgd mótvegis Føroya fólki. Við hesum fari eg tí at mæla til, at umboðsnevndin á fundinum fríggjadagin samtykkir eitt misálit á stýri og stjóra.

Fiskiloyvi

Svenning Borg
Vágur

Øll tey fiskiloyvi, sum eru ivasom eru útskrivað til fólkafloksmenn, og er hettar fólkaflokspolitikkur, tá ið hann er bestur. Fólkaflokkurin vil hava lógina um vinnuligan fiskiskap so fløkta sum møguligt, so at teir kunnu kroysta loyvi ígjøgnum skipanina til teirra viðhaldsfólk.

Líka frá tí, at tunfiskaloyvini blivu útskrivað, til nú, er eftir mínum tykki nøkur óreglulig loyvi givin og eru tey øll somul givin til fólkafloksviðhaldsfólk.

Tvey tunfiskaloyvi fyri at stilla upp fyri Fólkaflokkin, eitt annað vestureftir uppá somu treytir, størsta línuskip í føroyska fiskiflotanum kom eisini vestureftir uppá somu treytir, onkur trolari aðrastaðni eisini. Nú er tað so Jógvan S., sum skal dragast ígjøgnum fløkjuna. Hvør verður so næsti fólkafloksmaður, sum skal dragast ígjøgnum fløkjuna fyri at fáa eitt fiskiloyvi?

Um fiskivinnupolitikkur Fólkafloksins bleiv praktiseraður aðrastaðni, til dømis á Sicilien bleiv tað rópt fyri nakað sum mafiapolitikkur.

Málið við Jógvan S. verður neyvan tað seinasta, ið landsstýrismálanevndin kemur at viðgera, um Fólkaflokkurin framhaldandi kemur at sita við fiskivinnumálum.

Misálit á stýri og stjóra SEV's

Klæmint Olsen
umboðsnevndarlimur

Leiðsla SEV's kann koma við so nógvum umberingum, sum hon vil, men eina ferð má vera vell. Fyrra gula kortið var frammi á eykaumboðsnevndarfundi fyri fáum mánaðum síðan. Seinna gula kortið er nú ávegis. Hetta má merkja, at leiðslan leggur frá sær.

Stjórin var ógegnigur í Vágatunnils-málinum, og prógvast er, at hann tók ivasamar avgerðir í hesum sambandi. Hetta tóktist tó ikki at nerva hann sjálvan ella stýrið, ið ikki lætst um vón, heldur ikki eftir at umboðsnevndarformaðurin talaði at.

Fyrra gula kortið

Stýrið slapp undan einum formligum misáliti á fundinum 17. februar, men bara tí fleiri ógegnigir umboðsnevndarlimir sluppu at atkvøða. Tó samtykti umboðsnevndin, at stjórin skuldi ígjøgnum eina formliga tænastulig hoyring við tí í hyggju at geva honum eina átalu.

Hoyringin er av, og verður úrslitið lagt fyri umboðsnevndina á fundinum fríggjadagin. Havi eg skilt Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformann, rætt, so leggur hann upp til, at stjórin sleppur undan átalu í hesum umfari, men í staðin skulu mannagongdirnar í SEV strammast upp. M.a. mugu virkisøkini hjá teimum ymsu myndugleikunum í SEV – umboðsnevnd, stóri og stjórn – gerast greiðari. Hetta ljóðar alt sera skilagott, og eigur tað í øllum førum at verða gjørt.

Hans Tausen Olsen er tó ikki einsamallur at gera av, um hetta er nóg mikið. Tað er umboðsnevdnin, ið hevur samtykt hoyringina, og tað er hon, sum skal taka støðu til, hvat víðari skal henda.

Seinna gula kortið

Leiðsla SEV's hevur aftur havt yvirskriftirnar í fjølmiðlunum. Hetta í sambandi við sáttmálan við maskinmeistararnar. Eingin er einasta treytin fyri, at lívið kann livast. Og _. jamen Malan, tú situr og geispar. Far tú bara í song og droym teg so væl undir liðina á Jógvani, tí nú rími eg.

Góði Jógvan, Pætur dugir at siga tað. Og satt at siga, eg droymdi í nátt, at tín drúgva sjúkralega var ein óndur dreymur, og at tú komst til mín. Blide stunder, det har vi alle_"

Kærar heilsanir

frá okkum 5
Kona tín